# Býráðið

**Dagfesting:** 29.09.2022 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir: Kristian Martin Petersen for Edva Jacobsen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 30/22 | 22/00475-1 | Kristian Martin Petersen innkallaður sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin tann 29. september kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini. |
| 31/22 | 22/00208-9 | - Umsókn um byggiloyvi til bilhús |
| 32/22 | 22/00421-2 | Broyting av byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu, har byggistigið verður broytt frá 0,3 til 0,35 |
| 33/22 | 22/00253-13 | Fíggjarkarmar Fuglafjarðar kommuna 2023 |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

**Til støðutakan**

**30/22**
**22/00475-1 Kristian Martin Petersen innkallaður sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin tann 29. september kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.09.2022 | 30/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Nevnd/ir | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Edva Jacobsen, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 29. september 2022 kl. 19:00. Eftir ynski frá Edvu Jacobsen er Kristian Martin Petersen kallaður inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Kristian Martin Petersen er fjórðvaldi limurin á lista B við 46 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 29. september gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Kristian Martin Petersen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Edva Jacobsen, býráðslimur hevur forfall til býráðsfundin 29. september 2022 kl. 19:00. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri, mælir til, at Kristian Martin Petersen kann taka sætið í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 29. september 2022 kl. 19:00. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 27. september 2022 |
|---|---|

**Býráðið 29. september 2022:**
Býráðið tók einmælt undir við, at Kristian Martin Petersen tók sæti á fundinum 29. september 2022 fyri Edvu Jacobsen.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

**31/22**
**22/00208** - **Umsókn um byggiloyvi til bilhús**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.09.2022 | 66/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 31/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Eigarin av matr. nr. 223 hevur latið kommununi umsókn um loyvi til at byggja bilhús á ognini.<br>Umsitingin hevur málsviðgjørt umsóknina, og er komin til tað niðurstøðu, at eftir galdandi byggisamtykt, so verður nettonýtslustigið ov høgt, tá bilhúsið er roknað uppí verandi bygging á staðnum.<br>Havandi í huga, so standa allir bilarnir úti á vegnum sum nú er, sum er til stóran ampa fyri ferðslutrygdina í økinum.<br>Tekniska nevnd skal taka støðu til, um frávik skulu gevast í sambandi við umsókn um byggiloyvið til bilhúsið.<br><br>**Ískoyti til fundin í býráðnum 29. september 2022**<br>Tekniska deild hevur undir viðgerðini víst á, at nýtslustigið fer upp á 0,38 í sambandi við umsókn um byggiloyvi til bilhús. Galdandi byggistig er 0,3.<br>Tí mælir tekniska deild frá at ganga verandi umsókn á møti, grundað á, at byggistigið fer upp um verandi 0,3 sambært galdandi byggsamtykt. Eisini vísir tekniska deild á, at eitt bilhús er á ognini frammanundan.<br>Umsøkjarin hevur fingið til vega grannaloyvi í sambandi við umsónina.<br>Víst verður til svarskriv til umsókn um nýtt bilhús, sí FK j. nr. 22/00208-7, og kæra til svarskriv um umsókn til byggiloyvi, sí FK j. nr. 22/00208-8.<br><br>Tekniska deild hevur uppskot frammi um, at býta grundstykkið upp í tveir partar, og at eigarin fær loyvi til at keypa økið frá kommununi at leggja afturat til tann ovara partin, soleiðis at byggistigið kann halda seg innanfyri verandi áseting á 0,3. Hetta skal skiljast sum eitt uppskot til eina framtíðarloysn.<br><br>Málið var viðgjørt á fundi í teknisku nevnd, har tekniska nevnd samtykti at geva frávik og geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Havandi í huga ferðslutrygdina í økinum, so standa bilar á almennum vegi í økinum til ampa fyri trygdina. Um bilarnir koma at standa inni á egnum økið, so skuldi tað bøtt um ferðslutrygdina í økinum.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">At útvega parkeringpláss inni á privatari ogn.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3"><ul><li>Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Byggisamtyktin og BK17</li><li>Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 22/00208-1 Umsókn um byggiloyvi til bilhús<br>FK j. nr. 22/00208-6 Dagførd umsókn byggiloyvi til bilhús<br>FK j. nr. 22/00208-7 Svarskriv til umsókn um nýtt bilhús<br>FK j. nr. 22/00208-8 Kæra til svarskriv um umsókn til byggiloyvi</li></ul></td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Nei</td><td>Nei</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir til at geva eitt ávíst frávik frá galdandi nettonýtslustigi, grundað á, at bilarnir fara inn á privat parkeringspláss at standa, burtur frá almennum vegi.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum 29. september 2022<br>Málið varð viðgjørt á fundi í teknisku nevnd 15. September, har nevndin samtykti at geva frávik og geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn. Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at geva eitt ávíst frávik frá galdandi byggisamtykt, hetta fyri at betra um ferðslutrygdina á almennum vegi í økinum við Enniveg, og onnur slík mál verða viðgjørd einsæris, soleiðis at hetta mál ikki viðførir præsedens.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">15. september 2022.</td></tr>
</table>



**<u>Tekniska nevnd 15. september 2022:</u>**
Nevndin samtykti at geva frávik og geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn.

**<u>Býráðið 29. september 2022:</u>**
Býráðið tók einælt undir við, at geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn við tí áheitan, at hædd verður tikin fyri at vegalinjan verður beind.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**32/22**
**22/00421-2 Broyting av byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu, har byggistigið verður broytt frá 0,3 til 0,35**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.09.2022 | 65/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 32/22 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
| Stutt lýsing av málinum | Umsitingin hevur arbeitt í eina tíð við at broyta nýtslustigið í mun til gandandi byggisamtykt fyri Fuglafjarðar kommunu, sum í dag er sett til at vera 0,3.<br>Um hugsað verður um eittplanshús uttan høga reising, so er eitt byggistig á 0,3 í so tepurt, tá hugsað verður um plássið í einum eittplans húsum.<br>Fleiri kommunur hava broytt byggistigið frá 0,3 til 0,35, sum verður hildið vera meira passandi. Hetta viðførir, at grundstykkið verður gangnýtt betri.<br>Umsitingin arbeiðir við at broyta alla byggisamtyktina, grundað á, at hon hevur ikki verið dagførd í eina langa árarekkju.<br>Hildið verður neyðugt at broyta nýtslustigið nú, tí fleiri borgarar hava viðmerkt, at 0,3 er í so tepurt, serliga tá hugsað verður um eittplanshús uttan høga reising.<br>Umsitingin hevur gjørt eitt dømi uppá, hvussu uppskot til broyting kann koma at ávirka støddina á einum eittplanshúsi uttan høga reising.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 29. september 2022**<br>Málið hevur verið fyri í teknisku nevnd 15. september 2022, har nevndin samtykti at broyta almennu byggisamtyktina fyri Fuglafjarðar kommunu, soleiðis at byggistigið fyri økið B á 0,3 verður broytt til 0,35, og til 0,4 fyri eittplanshús. Grundgevingin fyri hesari broyting er at útnytta grundstykkið betri.<br>Broytingin er ikki galdandi fyri serstøku byggisamtyktirnar, so sum B1-økið úti á Land í sambandi við íbúðarbyggingina. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Boyting av nýtslustignum fyri at útnytta eitt grundøkið betri. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• Møgulig fylgiskjøl |

6

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at broyta byggismtyktina, soleiðis at galdandi nýtslustig á 0,3, veðrur broytt til 0,35.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundi í býráðnum 29. september 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd tann 15. september. Nevndin samtykti at broyta nýtslustigið til 0,35, tó til 0,4 fyri eittplanshús.<br>Viðmerkjast skal, at broytingin fevnir um almennu byggisamtyktina økið B, og ikki fyri tær serstøku byggisamtyktirnar, so sum B1-økið úti á Land. Broytingin verður løgd út til hoyring eftir galdandi reglum | | |
| Dagf | 15. september 2022.<br>29. september 2022. | | |



**Tekniska nevnd 15. september 2022:**
Nevndin samtykti at broyta nýtslustigið til 0,35, tó til 0,4 fyri eittplanshús.

**Býráðið 29. september 2022:**
Býráðið samtykti einmælt at broyta nýtslustigið í almennu byggisamtyktini frá 0,3 til 0,35. Fyri eittplanshús verður nýtslustigið 0,4.

**33/22**
**22/00253-13 Fíggjarkarmar Fuglafjarðar kommuna 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 29/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 33/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Sambært §39 í Kommunustýrislógini skal Fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til Fíggjarætlan fyri býráðið. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Fíggjarætlan skal leggjast fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober og skal verða endaliga samtykt við aðru viðgerð í býráðnum 1. desember.<br><br>Í fyrstu syftu er neyðugt at leggja karmarnar fyri tættirnar í fíggjarætlanini – inntøkur, rakstur og løgur. Neyðugt verður at stílað ímóti einum samlaðum yvirskoti í 2023 um komast skal fram ímóti eini javnvág ímillum álíkning og skuld. Í løtuni er nettoskuldin umleið 14.000 tkr. hægri enn ein álíkning við 23% skattaprosenti.<br><br>Tá tað kemur til inntøkur hava vit fingið framskriving av A-skattinum, eftirlønarskatti og inntøkum av DIS/FAS. Vit hava sjálvi gjørt metingar av ymiskum rakstrarinntøkum. Vit hava ikki fingið endalig tøl fyri partafelagsskattin í 2022 og hava tí trupult við at framskriva til 2023, eins og hesin altíð er tengdur at stórari óvissu.<br><br>Møguleiki er at tillaga inntøkurnar við at regulera skattaprosentið, økja um ymisk gjøld t.d. fyri tænastur á eldraøkinum(krevur lógarbroyting) ella at tillaga prísir í vøruskránni.<br><br>Tá tað kemur til rakstur eigur karmurin at verða lagdur fastur. Framskriving er gjørd við verandi aktivitet, prís- og lønarvøkstri. Eisini her eigur, at verða hugt eftir um virksemi skal tillagast.<br><br>Íløgurparturin eigur, at verða settur soleiðis at hann tekur hædd fyri ætlaða yvirskotinum á fíggjarætlanini 2023.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 29-09-2022**<br>Síðani fíggjarnevndarfundin er meting av partafelagsskattinum frá 2021 komin og vísir hesin eina inntøku uppá 21,4 mió. kr. ella 9,4 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | mió. kr. meira enn upprunaliga mett. Alt annað líka fer hetta at geva kommununi eitt samlað avlop uppá samanlagt 4-5 mió kr. í 2022. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Framløga FÆ2023 - excel |
| Viðgerð | |

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Mælt verður til at Fíggjarnevndin tekur støðu til at karmarnar fyri 2023 skulu verða soleiðis at yvirskot fæst á fíggjarætlanina so javnvágin ímillum álíkning og skuld kemur fram ímóti at javnviga.<br><br>**Tilmæli til býráðsfundin 29-09-2022**<br>Mælt verður býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um, at miða ímóti einum avlopi uppá 9 mió. kr. í 2023, soleiðis at skuldin verður ájavnt ella undir eini álíkning við ársenda.<br><br>**Tilmæli til býráðsfundin aftaná forfund 29-09-2022**<br>Aftaná dagførd inntøkutøl frá A- og partafelagsskatti verður mælt til at skattaprosentið verður óbroytt 21,25%, nettoraksturin verður 23,5 mió. kr., nettoíløgur verða 9,5 mió. kr. og úrslit aftaná avdráttir uppá umleið 7 mió. kr. Við hesum kørmum væntast, at nettoskuldin er í minsta lagi 11 mió. kr. undir eina álíkning ultimo 2023. |
| Dagf | 21. september 2022<br>26. september 2022 |



**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Fíggjarnevndin mælir býráðnum til, at miðað verður ímóti einum samlaðum yvirskoti uppá 9 mió. kr. í 2023. Mælt verður til at skattaprocentið verður hækkað ¼ % til 21½%. Inntøkurnar verða mettar til 131 mió. kr., rakstrarútreiðslurnar 114 mió kr. og løgurnar 8 mió. kr. netto.

**Býráðið 29. september 2022:**
Býráðið tók einmælt undir við, at halda fast við núverandi skattaprosent uppá 21,25%, ein nettorakstur uppá 23,5 mió. kr., nettoíløgur uppá 9,5 mió. kr. og eitt úrslit uppá 7,0 mió. kr. Við hesum kørmum væntast, at nettoskuldin er í minsta lagi 11 mió. kr. undir eina álíkning ultimo 2023.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 19.45

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Kristian Martin Petersen